# Fyrsta skotið í Hovstunlinum

**Klokkan eitt í gjár varð fyrsta skotið latið av í Hovstunlinum. Um eitt ár er væntandi, at tunnilin er boraður ígjøgnum**

**HOVSTUNNILIN**
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú er rættiligur skjøtil settur á arbeiðið at bora tunnilin ímillum Øravík og Hov.

Tað hendi klokkan eitt í gjár, tá ið fyrsta skotið varð latið av og nú verður so arbeitt uttan íhald, til tunnilin er boraður ígjøgnum.

Tað er íslendska felagið, Ístak, sum ger arbeiðið og teir hava annars verið á staðnum síðani tíðliga í vetur, men hesa tíðina hava teir brúkt at fyrireika arbeiðsplásið og at gera inntakið klárt at sprongja í.

Bogi Hansen, verkfrøðingur, sum hevur eftirlitið við arbeiðnum fyri Landsverk, sigur, at væntandi er, at komið er ígjøgnum tunnilin um eitt ár og í desember 2007, skal hann verða klárur at taka í nýtslu.

Hann sigur, at er vísir fjallið seg ikki at vera heilt ringt at arbeiða í, ivast hann ikki í, at tíðarfreistin fer at halda.

Hinvegin vita teir útfrá teimum kanningum, sum eru gjørdar, at tilfarið er ikki av tí besta allastaðni.

Serliga Øravíkarmegin, har teir eru byrjaðir at bora, er fjallið vánaligt einar 100 metrar inn.

Men eisini mitt í fjallinum er ein lind upp á einar 400-500 metrar, sum er vánalig.

Annars verður mett, at fjallið er gott, men full vissa fæst ikki, fyrrenn borað verður.

Tunnilin verður slakan 2,5 kilometrar metrar langur og harafturat skulu góðar 2200 metrar av vegi gerast av nýggjum ella broytast.

Í neðra er tunnilin 9,5 metrar breiður og koyribreytin er 7 metrar. Atkomuvegirnir eru 7 metrar breiðir við 1,25 metra breiðari vegøksl á hvørjumegin.



*Nú er arbeiðið upp á Hovstunnilin byrjað av álvara og á miðdegi í gjár varð fyrsta skotið latið av. tað gekk alt, sum tað skuldi og gongur sum ætlað, er tunnilin boraður ígjøgnum um eitt ár*

# Fingu hvørki vátt ella turt aftaná fyrsta skotið

**Tað er við at koma inflatión í tey almennu hátíðarhaldini, heldur stjórin í Landsverki**

**HOVSTUNNILIN**
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tá ið fyrsta skotið varð latið av í Hovstunlinum, var tað gjørt mestsum í loyndum.

Sostatt var als onki hóvasták gjørt burtúr hesi hending.

Tað eru mong, sum eru vónbrotin av, at púra onki varð gjørt burturúr

Tá ið slíkar hendingar eru, plaga verða skipað fyri hátíðarhaldi aftaná, men í hesum føri var hvørki vátt ella turt at fáa.

Ei heldur vóru umboð fyri Landsverk og landsins myndugleikar at síggja.

Tað varð annas gjørt klárt til hátíðarhald, tí arbeiðshøllin varð ruddað og hampað so at ein lítil samkoma kundi vera inni har.

Men so fingu tey at vita frá Landsverki, at onki skuldi gerast burturúr og tískil varð skotið latið av uttan nakað.

Onkur av teimum, sum eru vónbrotin av hesum, halda, at tað var ikki neyðugt at skipa fyri teirri stóru veitsluni, men ein kaffimunnur kundi verið til arbeiðsfólkið og onnur, sum løgdu leiðina framvið, tí talan er veruliga um eina stórhending í Suðuroy, siga vónbrotnir suðuroyingar, sum vísa sína misnøgd.




*r verður gjørt klárt at skjóta fyrsta skotið, men tað varð latið av, uttan at nakað sum helst hóvasták varð gjørt burturúr og tað er fallið mongum suðuroyingi fyri bróstið*

### Inflatión

Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverki, sigur, at tey hava gjørt av, at onki skuldi gerast burturúr, nú fyrsta skotið er latið av.

Men tað var ikki tí at tey ikki tímdu til Suðuroyar, ella tí at tey ikki untu suðuroyingum eitt hátíðarhald.

– Tað eru so nógvir tunlar og almenn arbeiði, at tað er við at koma inflatión í almenn hátíðarhald, sigur stjórin í Landsverki.

Hann sigur, at fyrr var vanligt at gera nógv burturúr, tá ið fyrsta skotið varð latið av í einum tunli, men tá var ikki so ofta, at tunlar vóru gjørdir. Í sambandi við undirsjóvartunlarnir var eisini hátíðarhald, men tað eru størri verkætlanir.

Kortini sigur Óvindur Brimnes, at hann væntar avgjørt, at hátíðarhald verður, tá ið seinasta skotið verður latið og av og tá ið tunnilin verður tikin í nýtslu.